# Nøvn

## Maður verður áttati

Hóast hann nú fer um áttati ára aldur, ber hann høvur hægri enn flest aðrir bygdarmenn. Stillførur og fattur. Hvør skuldi trúð, at árini vóru so mong hjá hesum manni, sum enn er við í so mongum leiki í bygd og av bygd.

Jógvan Elias Joensen f. 28. desembur 1930 var næsti sonurin hjá Thildu og Hjalmari við Neyst, sum barnaár hansara var keypmaður, reiðari og næstformaður í kommununi. Jógvan Elias var uppkallaður eftir beiggjanum, sum doyði í sama mánaði árið fyri bert eitt ára gamal. Mamman var úr Miðvági, f. Thomsen 1892. Ungur fór Jógvan Elias í realskúla í Klaksvík og víðari á keypmansskúla í Keypmannahavn og tók at enda hægri handilsprógv á Niels Brocks Handelsskole í 1956. Jógvan Elias hevði tí holla teoretiska barlast til skrivstovuarbeiði í heilsølum, handli og virkjum, sum hann næstu mongu árini røkti, og sum aðrir duga at siga frá.



Fyrst og fremst hevur Jógvan Elias verið bygdarmaðurin, sum á ymsan hátt hevur havt vælferð hennara í huga. Hann hevur við ídni verið við til at bøtt um ella slóðað fyri nýggjum tiltøkum bygdini til frama t.d tók hann saman við øðrum stig til svimjihyl í fimmtiárunum, bygdarhús í sjeytiárunum og Lugarið í nítiárunum. Hann hevur m.a. verið formaður í vatnfelagnum Áargarður, formaður í Ognarhaganum, grannskoðari í kommununi og stevningarmaður, var í Frost, er í Tavuni, er fíggjarligur ráðgevi í Bygdarhúsinum, hevur verið ella er enn í stýrinum fyri Norðoya Sparikassa og í nevndini hjá Lyons Club Eysturoy og so fram vegis. Nú er hetta so beskeðið sagt, so sum Jógvan Elias sjálvur vildi sagt tað. Beskeðin er hann, ger ikki hóvasták burtur úr sær sjálvum, er opin og heldur tó kortini nær bróstinum. - Men Tavumenninir hava tikið til, at stóð á í onkrum máli, hevði Jógvan Elias vektina.

Jógvan Elias er hegnismaður og hartil fróðarmaður. Hann treður dansin, telgir tættir bæði um fólk, um kór og kommunuval, hann kvøðir bygdini hásong og savnar siðsøguligt tilfar. Serstakliga er nógv myndatilfar savnað, sum hevur verið at sæð á sólarkaffi í Bygdarhúsinum, onkabarninum hjá Kristionnu, konuni, og honum. Eitt framúr væleydnað tiltak - bæði Bygdarhúsið og sólarkaffið. Eitt av tøkunum síðstu árini hevur verið saman við øðrum at fáa Leirvíkar bygdarsøgu skrivaða.

*Og vesturskinið litar fjøll og skørð,*
*alfagrir geislar farga líð og fjørð.*
*Í favni tínum kenni eg mær trygd*
*tú fagra, fríða, forna Leirvíksbygd.*

Um stutta tíð sær sólin aftur á hugans Kráartanga, vesturskinið litar aftur fjøll og skørð, og vestanskuggin svalir tær sólbrenda ennið. Væl veri tær bygdarmaður, hjartaliga til lukku og mong góð ár í vesturskininum ynskist tær og tykkum báðum.

**Martin**

## Dánjal Pauli í Búðini farin

Jólamorgun andaðist Dánjal Pauli Danielsen á Velbastað, fyrrverandi bóndi og landsstýrismaður, 91 ára gamal. Dánjal Pauli búði á Velbastað alt lívið, har hann festi garðin í Búðini. Hann var virkin í politikki, kom tíðilga upp í Fólkaflokkin, og hann gjørdist landsformaður hjá Fólkaflokkinum, tá valfeløgini skipaðu landsfelag. Hetta var ein strævin tíð hjá flokkinum, sum hevði dalandi undirtøku, eftir at flokkurin hevði havt sera stóra undirtøku í fýratiárunum.



Dánjal Pauli Daneilsen kom í landsstýrið, tá Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin skipaðu landsstýrið eftir valið í 1974, og hann sat í hesi samgongu, til hon legði frá sær eftir valið í 1980. Har umsat hann eitt nú samferðslu, landbúnaðin og mentanina. Hann var eisini kendur fyri píkamálið, tá hann mælti til at banna píkadekkum.

Dánjal Pauli hevur eisini sett síni spor innan jarðarbrúkið, ikki bara sum bóndi, men eisini sum formaður og nevndarlimur í Jarðarráðnum í mong ár. Hann var eisini umboðsráðslimur hjá SEV í 12 ár. Eitt av hjartamálum hansara var Norðurlandahúsið í Havn, og har sat hann sum stýrislimur í 14 ár í tíðarskeiðnum 1980 til 1998.

Seinastu árini hevur Dánjal Pauli Danielsen verið á Lágargarði í Havn.

Dánjal Pauli var giftur við Helene Marie fødd Jacobsen úr Havn, og tey áttu dóttrina Súsannu Danielsen, sum er stjóri í Umsiting Løgtingsins.

---

Kunngjørt verður, at

**Dánjal Pauli Danielsen**
**í Búðini á Velbastað**

andaðist jólamorgun, 91 ára gamal.

Kistan fer úr Búðini í Kirkjubøar kirkju týsdagin 28. desember kl. 14.00.

Jarðarferðin verður úr Kirkjubøar kirkju mikudagin 29. desember kl. 13.00.

**Amalia og Súsanna**

---

## TØKK

Hjartans takk fyri sýnda samkenslu,
tá góði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Herluf Thomassen**
**Sandavágur**

andaðist og fór til gravar.
Takk til starvsfólkini á B7,
og tykkum øll, sum vitjaðu hann.
Takk til øll, sum hjálptu til við ervinum.
Takk til David Johannesen, prest.
Takk fyri blómur, kransar
og peningagávur til Sandavágs kirkju.
Takk til tykkum mongu, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.
Gleðilig jól.

*Familjunnar vegna*
**Ketty, Ísak, Albert og Eiler**

